# Hugstoytandi harmaljóð frá Landsfelag Pensjonista

HANS PAULI STRØM
løgtingsmaður



**- um nýggja sjúkratrygging, ið júst pensjonistarnir fáa størstu fyrimunirnar av!**

Endiliga - eftir 15 ára togarí verður nú framdur ein nútímans reformur av avoldaðu sjúkrakassaskipanini:

**stigið:** 1. jan. 2010 verða sjúkrakassarnir tiknir av og nýggj almenn heilsutrygd sett á stovn, sum tekur burtur ójavna gjaldið í ymisku økjunum.

**stigið:** 1. apr. 2010 verður nýggj samhaldsføst tilskotsskipan til heilivág sett í verk.

**stigið:** 1. jan. 2011 fáa allir føroyingar nýtt altjóða heilsutrygdarprógv.

**stigið:** 1. jan. 2011 verður heilivágsskipanin hjá apoteksverkinum samanbundin við elektronisku heilsuskipanina hjá kommunulæknunum og sjúkrahúsverkinum.

**stigið:** 1. jan. 2012 verða persónligu gjøldini til heilsutrygdina tikin av og flutt inn í samhaldsføstu landsskattafíggingina

Fyrsta almenna - og ófatiliga negativa - viðmerkingin hjá Landsfelag Pensjonista til henda stórfingna reformin er tíðindaskriv undir herrópinum: ”**Landsfelag Pensjónista mótmælir og harmast um, at skipanin um heilsutrygd vendir tunga endan niðureftir.**”

**Tey við størsta tørvinum fáa størstu fyrimunirnar!**
Fyri lítlum ári síðani, meðan undirritaði enn var landsstýrismaður í heilsumálum, fóru vit undir arbeiðið at gera eina nýggja sjúkratrygging at koma ístaðin fyri avoldaðu sjúkrakassaskipanina. Nú eg síggja lidna uppskotið, ið nýggi landsstýrismaðurin í heilsumálum hevur sent til hoyringar, eri eg ógviliga fegin um, at tað er blivið enn betri – við enn fleiri fyrimunum til teirra, ið hava størstan tørvin á stuðuli – og fram um alt eru fyrimunirnir størstir fyri pensjonistarnar!

Tí er ógviliga hugstoytandi – og óskiljandi - at hoyra og lesa almennu viðmerkingina frá Landsfelag Pensjonista, sum onki annað er enn eitt ósakligt, kolasvart harmaljóð.

**Hámarkið fyri heilivág hjá pensjonistum fer niður í 1195 kr. um árið!**
Verður nýggja sjúkratryggingin – ið skal bera vakra heitið ”Heilsutrygd” - til veruleika, so fær ongin so nógv burturúr sum júst pensjonistarnir. Tí í uppskotinum er eisini innbygd ein nýggj tilskotsskipan til heilivág, sum fer at minkað hægsta gjaldið hjá øllum fólkapensjonistum (og børnum undir 18 ár) heilt niður í 1195 kr. um árið – svarandi til 99,58 kr. um mánaðin!

**Harumframt fáa pensjonistar stuðulin aftur til ískoytisheilivág!**
Øll vita um harðliga kritikkin av avgerðini hjá landsstýriskvinnuni í almannamálum, tá stuðulin til ávís heilivágsískoyti varð tikin burtur 1. jan. 2009. Hetta snýr seg m.a. um ávís sløg av kostískoyti, sum m.a. bæði fólka- og fyritíðarpensjonistar hava fyri neyðini. Tað snýr seg m.a. um serlig ískoyti av vitaminum og mineralum, um serlig kostískoyti til diabetikarar, um pínutablettir, allergitablettir, eygnaheilivág o.s.fr. Haraftrat er ymiskur heilivágslíknandi útbúnaður, sum fólka- og fyritíðarpensjonistar eisini hava mist stuðulin til. Og sum ein av størstu trupulleikunum, sum hevur verið framførdur, er misti stuðulin til ávísan heilivág til eldri demenssjúklingar, ið er serstakliga kostnaðarmikil.

Við nýggju sjúkratryggingarskipanini, Heilsutrygd, verður møguligt aftur at innføra stuðulin til tað mesta av hesum ískoytisheilivági! Her fara apoteksog heilsuverkið at gera ein positivlista, sum vísir á, hvørjar av hesum vørum tann einstaki fólka- og fyritíðarpensjonisturin, eins og onnur varandi sjúk, kunnu fáa stuðul til eftir tilmæli frá kommunulækna.

**Hevur Landsfelag Pensjonista kikaran fyri blinda eygað?**
Eg haldi – álvaratos - at Landsfelag Pensjonista hevur havt kikaran fyri tað blinda eygað, tá tey nú skjóta við skørpum eftir nýggju sjúkratryggingarskipanini, Heilsutrygd. Landsfelagið (ella kanska tann, sum hevur skrivað tíðindaskrivið fyri nevndina í Landsfelagnum) hevur start seg blindan uppá hetta eina, at gjaldið ikki beinanveginvegin, longu nú 1. jan 2010 fer inn í skattin. Og ritarin hevur so sett allar hinar veldugu fyrimunirnar til viks! Tað tykir mær rættiliga óreiðiligt. Og eisini óklókt í mun til áhugamálini hjá Landsfelag Pensjonista. Tað er rætt, at tað ikki stendur í sjálvum lógaruppskotinum, at gjaldið fer inn í skattin 1. jan 2012. Men lógaruppskotið snýr seg bert um broytingarnar, sum verða settar í verk nú í komandi árið. Tær eftirfylgjandi broytingarnar – m.a. at gjaldið fer inn í skattin – tað stendur greitt og skilliga í viðmerkingunum til uppskotið, ið lýsir allar broytingarnar sum eina tilgongd, ið tekur 2 ár at fremja.

**Tvey ár at fáa útreiðsluna uppá 100 mió inn á fíggjarlógina**
Fyrsta og avgerandi treytin fyri, at gamla sjúkrakassagjaldið kann leggjast inn í skattin, er júst at avoldaða sjúkrakassaskipanin verður tikin av, og ein nýggj almenn Heilsutrygd verður sett á stovn ístaðin. Tann fortreytin verður skapt við hesum lógaruppskotinum. Síðani skal skipanin gerast – og ikki minst fíggjarligu fyritreytirnar skapast, fyri at alt gjaldið fyri sjúkratryggingina – tað er meir enn 100 mió. kr.um árið! - verður tikið inn á fíggjarlógina. Og tað veit ein og hvør, at í hesum døgum merkja 100 mió meir inn á fíggjarlógina eitt av trimum:

Antin 100 mió í skattahækkingum.

Ella 100 mió meir í hallið á fíggjarlógini.

Ella 100 mió meir í sparingum ymsastaðni í samfelagnum, har tað svíður nóg hart sum er.

Men samgongan hevur gjørt av – og tað hava vit skrivað inn í tekstin til viðmerkingarnar til lógaruppskotið – at í seinasta lagi um tvey ár taka vit hetta ódnartakið, at taka sjúkratryggingina inn á fíggjarlógina, so hon verður goldin yvir tann samhaldsfasta landsskattin. M.a. við teirri avleiðing, at pensjonistar og onnur við lægst inntøkunum sleppa mest sum heilt undan at gjalda fyri sjúkratryggingina.

**Ongin átti at fegnast meir enn júst Landsfelag Pensjonista!**
Vit eiga at frøast um nýggju sjúkratryggingina, sum nú er á veg í Løgtingið. Og ongin átti at verið meira fegin og positivur enn Landsfelag Pensjonista – ongin átti meir enn Landsfelag Pensjonista at fegnast um, at hendan tilgongdin, sum tað hevur verið tosað úrslitaleyst um í eini 10-15 ár, nú verður sett á verk. Fyrstu stóru stigini longu í komandi ári – og síðani framt til fulnar stigvíst tey næstu tvey árini.

Eg ynski partamanninum, Akseli V. Johannesen, landsstýrismanni í heilsumálum, Heilsumálaráðnum og Løgtingsins Trivnaðarnevnd eina hepna hond við at føra hesa stórfingnu ætlan heilt á mál!

# Demokratia á ferð - fyrilestrar kring landið

*Tíðindaskriv*

Mikukvøld er Demokratia-kvøld. Fyri at kalla allar føroyingar. Tí nú fer Demokratia undir áhugavert tiltak, sum verður á skránni trý mikukvøld í oktober og november. Talan er um fyrilestrar, ið verða hildnir á seks ymsum støðum í Føroyum.

Fyrilestrarnir viðgera evni, sum snúgva seg um javnstøðu í politikki, um demokrati og politisk rættindi og um aðrar spurningar, ið eru viðkomandi fyri arbeiðssetningin hjá Demokratiu, sum er økt javnstøða í politikki.

**Persónarnir, sum høvi verður at hoyra, og teirra fyrilestrar, eru:**
- Hallbera West heldur fyrilesturin Tá politisk rættindi ikki eru nokk.
- Bjørt Samuelsen heldur fyrilesturin Tora vit at vilja valdið? Um at gera seg galdandi á politiska vígvøllinum og vera sjónlig í fjølmiðlunum og í almenna rúminum.
- Sámal Matras Christiansen heldur fyrilesturin Javnstøða fyri øll? Ella bara fyri Yuppie kvinnur? Tríggjar hypotesur um javnstøðu.
- Halgir Winther Poulsen heldur fyrilesturin Um demokrati sum hugtak.
- Sonja Jógvansdóttir heldur fyrilesturin Javnstøða í tómgongd.
- Elin Mortensen heldur fyrilesturin Hava vit ikki javnstøðuí Føroyum?
- John Dalsenni Olsen heldur fyrilesturin Kvinnur og menn - fólkaræði og sannleiki

**Støðini, har fyrilestrarnir verða hildnir, eru:**
- Suðuroy: Skúladepilin í Suðuroy
- Sandoyggin: Skúlin á Sandi
- Vágar: Skúlin á Giljanesi
- Streymoy: Søgu- og samfelagsdeildin á Fróðskaparsetri Føroya í Tórshavn
- Eysturoyggin: Handilsskúlin á Kambsdali
- Norðuroyggjar: Tekniski skúlin í Klaksvík

Fyrilestrarnir verða hildnir mikukvøldið 28. oktober, mikukvøldið 11. november og mikukvøldið 25. november. Tiltøkini byrja klokkan 19.30 og vara umleið ein tíma.

Ein fyrilestur verður á hvørjum staði. Tiltøkini eru almenn og ókeypis. Eisini verður høvi hjá áhoyrarunum at seta spurningar.

Lesið meira um fyrilestrahaldararnar og um skránna fyri tiltøkini á www.demokratia.fo

# Mvg-ránið heldur áfram

FRANK DAVIDSEN
Sørvágur



Fyri umleið 15 árum síðani varð almenningurin kunnaður um, at ein fyritøka í Vágum hevði snýtt landskassan fyri, minnist meg rætt, oman fyri tríggjar milliónir krónur. Siger og skriver: tríggjar milliónir. Ein upphædd, ið fyri mær tyktist ørandi, tá ein hugsar um allar tær fyritøkur, sum í tí stilla snýttu og framvegis í dag snýta landskassan fyri tíggjutals, ja kanska hundraðtals milliónir krónur, síðan mvg-lógin kom í gildi.

Nøkur ár seinni varð almennur persónur, sum um tað mundið var við til at smíða landsins lógir, tikin fyri beinleiðis stuldur við einum vinnutólið, har seriunummarið var tikið av hesum tóli fyri at fjala stuldurin. Hvat hendi? Sjálvandi einki.

Meðan landskassin stríðist við risahall, og stovnar á Landssjúkrahúsinum steingja ella liggja bakk vegna vantandi fígging, endurtekur søgan seg, nú fjølmiðlar leggja fram mvg-undandrátt upp á tríggjar milliónir krónur hjá einum einstøkum partafelag.

Tí er hettar bert toppurin av ísfjallinum, tá hugsað verður um, at vit hava eini 1000 ella 1500 partafeløg skrásett í Føroyum. Sostatt kann ein mvg-lóg, sum als ikki er regulerað, síðani hon kom í gildi, kosta Landskassanum og tí vanliga skattaborgarnum eina upphædd, ið slær øll met í politiskari líksælu. Hetta hóast tað frá byrjan av hevur borið til at staðfest, at tað regulert verður spekulerað í mvg-undandrátti, tá feløg fara á húsagang.

Sama skilið gjørdi seg galdandi, tá A-skattaskipanin varð sett í verk í 1984. Meðan vanligi skattgjaldarin øll hesi árini á ongan hátt hevur kunnað sloppið sær undan sínum skyldum, so hevur B-skattgjaldarin kunnað gjørt sær dælt av hesi skipan, soleiðis at eftirstøðurnar í tí sambandi hava verið kanska líka ógvusligar sum tann mvg-undandráttur, ið er farin fram øll hesi árini.

Nú spurnartímin í Løgtinginum er vorðin so áhugaverdur, at tað bara restar í, at løgtingsumboðini fara at spyrja landsstýrismenn, hvat nummar av skóm teir ganga í, vil eg við hesum heita á somu løgtingsumboð um at seta fyrispurning um, hvussu nógv landskassin og harvið tann vanligi skattgjaldarin hava mist í B-skatti og í mvg, síðani hesar skipanir komu í gildi.

Takk fyri.